# TILTØK

**Gudstænastur Kristi Himmals-ferðardagur 20. mai**
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, Mogens T. Christensen (Luttøka av norskum kirkjukóri). Í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri Kirkjuliga Missiónsfelagið
*Porkeri:* kl. 12, Martin R. Jacobsen. (Tjørnuvíkingar syngja Kingo) Talvan gongur fyri Kirkjuliga Missiónsfelagið
*Kunoy:* kl. 12, altarg.,
*Sambýlið á Heygnum:* kl. 19.30 Hans E. Hammer
*Hov:* kl. 12, Patrick de Neergaard. Talvan gongur í øllum kirkjum í Suðuroyar sunnara prestagjaldi fyri Kirkjuliga Missiónsfelagið
*Kollafjørður:* kl. 11, konfirmatión, Marjun Bæk
*Sandavágur:* kl. 11, David Johannesen. Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri Kirkjuliga Missiónsfelagið
*Havnar kirkja:* kl. 11, Jóannis Fonsdal
*Nólsoy:* kl. 12, Bjarni Bæk
*Kaldbak:* kl. 12, S. Klein. Talvan gongur í kirkjunum í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi fyri Kirkjuliga Missiónsfelagið
*Eiði:* kl. 11, Deyvagudst., altarg., Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Ytrimissión
*Gjógv:* kl. 11 messa
*Funningur:* kl. 12.30 messa, Emil Olsen. Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Føroysku Heidningamissiónina hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum
*Hattarvík:* kl. 12,
*Kirkja:* kl. 17, Elsa Funding. Talvan gongur í Norðoya eystara prestagjaldi fyri Heidningamissiónina hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum
*Tjørnuvík:* kl. 11, Inga Poulsen Dam. Í Vestmanna gongur talvan til frama fyri Heidningamissiónina hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum
*Tvøroyri:* kl. 11, Helgi Bróbjartson. Talvan gongur fyri Ytrimissión
*Rituvík:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Argir:* kl. 11, Uni Næs og Bergur D. Joensen
*Skopun:* kl. 12, Jákup R. Hansen. Talvan gongur í Sandoyar prestagjaldi fyri ytrimissiónsarbeiðið hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum
*Selatrað:* kl. 11, altarg., Jógvan Fríðriksson. Talvan gongur í Sjóvar prestagjaldi fyri Kirkjuliga Missiónsfelagið

**Missiónshúsið við Landavegin**
Møti Kristi Himmalferðadag kl. 18 v/ Martin Thomsen.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti við Jústines Poulsen.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Í kvøld kl. 18 Gallakvøld.
Leygarkvøldið kl. 21 Bøn í býnum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti v/ André og Mary, kl. 18 Útimøti á Vaglinum.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Kristihimmalferðardag kl. 20 verður almennur fundur við majorunum Marianne og Torgeir Nybo. Marianne greiðir frá arbeiðinum sum gøtuoffiserur í Oslo.
Kvinnustevnan byrjar fríggjadagin kl. 20.00.

**Meinigheitshúsið**
Kristi himmalferðardag kl. 18 Møti við Klæmint Tausen, Teir 4 syngja.
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Kurt Joensen frá SAT7, Fríða syngur.

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 22. mai kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á Familjumøtinum kl. 10.30 sigur Poul Joensen frá trúboðaravirkinum á Papua Ný Guinea. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Zachariassen um evnið: »Hvat lærir Bíblian um at geva«. Barnaansing fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 Bøn og bíbiltími. www.livdin.fo

**Samkoman Rhema**
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli.
www.rhema.fo

**Frá Ebenezer**
Hósdagin Kr. himmalsf. kl. 18 Evangel. møti.
Fríggjadagin kl. 21 Teen-Night.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Spennandi kvøld við kappingum, spølum o.ø.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Rúna Rasmussen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC: Evnið er »At verða leiddur av Heilaga Andanum«. 2. partur v/ Jaspur Johannesen, kl. 18 Sjónvarpsmøti í Evangeliihúsinum.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin v/ Annu Guttesen.
www.filadelfia.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Kristi Himmalferðardag Hámessa kl. 11 v/ Andrzej Wydrzynski, prestur í Mariukirkjuni.
Fríggjadagin biðja vit rósukransin saman í Kerit kl. 19.30.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ Andrzej Sydrzynski, prestur í Mariukirkjuni.
Kl. 14 Sunnudagsskúli.

**KFUM og KFUK í Havn**
Onki verður í KFUK vegna Kristi Himmalferðardag.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti við Fríðbjørn Poulsen, Helgi Henriksen talar. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Nesvík**
Felagsmissiónsvikan heldur áfram í dag kl. 11 v/ deyvagudstænastu í Eiðis kirkju v/ Jónsvein Bech og hugnadagur fyri teim deyvu og familjum teirra í Nesvík, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Kristian Joensen og Raimund Langgaard, sangbólkur syngur. Innsavnan.
Fríggjadagin kl. 19 Bønarmøti, kl. 19.30 Møti við Knút Larsen, úr Fuglafirði, og Sigred Johannesen, av Nesi. Miktam syngur.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Vitjan av Flemming Berg og Torben Søndergaard: Ungdómsmøti fríggjakvøldið kl. 21 og leygarkvøldið kl. 21.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og kl. 19 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Einki opið hús leygarkvøldið vegna møtini í Lívsins Orð, Runavík.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Hjørdis H. Petersen.
Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Fríggjakvøldið 21. mai kl. 21 verður Café í Meinigheitshúsinum, Gimme Olsen kemur at hava møti. Dramabólkur framførir. Suppa verður aftaná møti. Øll eru vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Møti verður Kristi himmalsferðardag kl. 18.
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Manskórinum í Vágum. Ársgávan til Heimamissiónina verður savnað inn. Aftaná møti verður felags nátturði.

**Missiónshúsið í Leirvík.**
Kristi himmalsferðardag kl.18.00 Sang og vitniløta.
Sunnudagin møti kl.18, tey ungu skipa fyri.

**KFUM & K, Klaksvík**
Kr. Himmalferðardag kl. 18 Møti við Ólavur Jóhannessen.
Fríggjadagin kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Peter O. K. Olofson.
Ungdómsmøti kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 11 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Preben Hansen og aðrir tala.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Kirkjan í Mikladali**
Møti verður í kirkjuni í Mikladali Kristi Himmalsferðardag kl. 19.30 við luttøku úr KFUM & K í Klaksvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Evangel. møti á Húsum á Kalsoynni**
Leygardagin kl. 14 Barnamøti, kl. 16 Útimøti – um viðrar – kl. 20 Evangel. møti.
Sunnudagin kl. 14 Barnamøti, kl. 16 Útimøti – um viðrar – Herman og Gigga syngja, Tórmund og fleiri luttaka.

**Missiónshúsið í Skopun**
Kristi himmalsferðadag einki møti vegna møti í Húsavík.
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Jon Eli Johannesen.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsangur, kl. 18 Møti v/ Jon Eli Johannesen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Vælkomin í Betania.

**Frá Heimamissiónini**
Meinigheitskórið hevur møti í Ungmannahúsinum »Samljóð« í Skopun Kristi Himmalsferðardag kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ungmannafelagshúsið Sólarris, Húsavík**
Kristi himmalsferðardag kl. 18 Sang og vitnimøti, Kajberg Davidsen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Kristihimmalferðardag verður møti kl. 18 við Ungdóminum.
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn hvørt møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Porkeris skúli**
Kristihimmalferðardag kl. 20 hevur felagskórið hjá brøðrasamkomunum í Suðuroynni sangfund í Porkeris skúla. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Kr. Himmalferðardag kl. 18 Evangel. fundur.
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Kristi Himmalsferðardag kl. 18 Møti.
Fríggjakvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.

**Føroyahúsið**
Fríggjakvøldið 21. mai kl. 20.30 hevur Kristnastova fríggjakvøldsmøti í Føroyahúsinum. Jógvan Jacobsen talar. Vitnisburður. Nógvur góður og lættur felagssangur við sera góðum tónleikarum og sangarum. Ókeypis te/kaffi og køkur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kristnastova**
Fríggjakvøldið 21. mai er fríggjakvøldsmøti ikki í Kristnastovu, men í staðin í Føroyahúsinum kl. 20.30.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Hósdagur 20. mai***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 21. mai***
kl. 10-12 Handverk, øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 12-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 23. mai verður gongutúrur eftir Saksunarvegnum (bygdagøtan Vík-Saksun). Miðal tungur túrur, gingið verður 3-4 tímar. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
***Mánadagin 17. mai***
Fimleikur við Jóhannu Troest
***Týsdagin 18. mai***
Ítriv fyri áhugað
***Mikudagin 19. mai***
Undirvísing í Boccia v/ Jóhan Danielsen
***Hósdagin 20. mai***
Kristi Himmalferðardagur – stongt
***Fríggjadagin 21. mai***
Opið hús

*Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.*

## BRÚDLEYP

Leygardagin 22. mai kl. 16.00 giftast í Sands kirkju Páll á Reynatúgvu, Sand og Kristina Johannesen, Sand. Kl. 20.00 verður borðhald fyri innbodnum í Virkinum á Sandi.

Leygardagin 5. juni giftast Elsebeth Joensen, Fuglafjørður og Óttar á Lofti, Sandavágur. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 16.00. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.30.

Leygardagin 5. juni kl. 11.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík, Sonja Sólbjørg, Klaksvík og Jonhard Danielsen, Søldarfjørður. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 22. mai á tlf. 442099, 441199 ella 455438.

Leygardagin tann 19. juni kl. 15.00 giftast á býráðsskrivstovuni í Vági Malan Klakkstein og Alex Vilhelm. Vælkomst verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 374004, 269537 og 573006 innan 28. mai 2004.

Leygardagin 26. juni giftast Jannet Hanusardóttir, Nes og Pauli Højgaard, Rituvík. Vígslan verður í Fríðrikskirkjuni kl. 14.00. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan leygardagin 12. juni á tlf. 448169, 262067 ella 447805.

26. juni kl. 16.00 giftast í Skopunar kirkju Annika Ryggstein og Remi Nicolajsen. Vælkomst verður í Samljóð kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá innan 12. juni á tlf. 361995, 361047, 361779.

10. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Solina Joensen, Skopun og Hans Ib Jacobsen, Tórshavn. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, kunnu tekna seg á tlf. 255263 ella 320391 eftir kl. 19.00. Seinasta freist at tekna seg er 15. juni.

## GULLBRÚDLEYP

Sunnudagin 4. juli hava hjúnini Jóna og Hans Jacob Andreasen, Klaksvík, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Tekniska skúla í Klaksvík leygardagin 3. juli kl. 16.00. Tey, sum vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 455782 ella 456772 innan 21. juni.



# 27. Færø-March verður Kristi himmalferðardag

GONGUTÚRUR
*Tíðindaskriv*

March-nevndin hjá Mjørkadals Idrætsforening bjóðar aftur í ár til Færø-March. Hetta er 27. ferðin, at teinurin verður gingin.

Gongutúrurin byrjar við Keypsamtøkuna í Hoyvík kl 12 og endar umleið kl 16 í Mjørkadali.

Ongar treytir eru fyri luttøku, fólk skulu bara møta við Keypsamtøkuna, siga fyrireikararnir – og tey eru væl komin at taka familjuna, vinir ella kenningar við.

Farleiðin er Keypsamtøkan í Hoyvík, Vegurin Langi, Óluvugøta, Sundsvegur, Norðari Ringvegur, Oyggjarvegur, Mjørkadalur. Ferðslureglar skulu haldast, t. v. s. at gangast og rennast skal í vinstru síðu, har eingin gongubreyt er.



Steðgað verður av og á, har luttakararnir kunnu keypa sær okkurt at leska sær við. Tá komið er í Mjørkadal verður møguleiki at keypa pylsur og breyð eins og at fáa vætujavnvágina í rættlag aftur, eins og møguleiki verður fyri at keypa diplom og medalju. Skipað verður fyri flutningi aftur til Havnar.

Luttakarar við trim/marchbøkrum fáa hesar stemplaðar, siga fyrireikararnir, sum eisini vísa til heimasíðuna www.mjorkadal.com

# Norsk kórkonsert í Gøtu Kirkju

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Leygarkvøldið kl 19 verður konsert í Gøtu Kirkju við norska kórinum »Levanger Blandakor« og Felagskórinum Gøta/Leirvík. Norska kórið fer fyrst og fremst at framføra sítt egna program, men tey fara eisini at royna seg saman við Felagskórinum Gøta/Leirvík, tí kórini bæði fara at framføra eitt føroyskt og eitt norskt lag saman.

Kórið úr Levanger varð stovnað í 1978 og hevur soleiðis 26 ár á baki. Ein av stovnarunum var Per Anker Johansen, og hann hevur verið kórleiðari øll árini. Eisini eru tað nakrir av sangarunum, ið hava verið við alla tíðina. Dagliga heldur kórið til í »Musikkens Hus« í Levanger.

Kórið hevur alla tíðina ment seg bæði í stødd og musikalskt. Við á ferðini ti Føroya verða 45 sangarar.

Kórið er mest kent fyri sína afturvendandi nýggjárskonsert í Levanger Kirkju og fyri at skipa fyri »Syngið við kvøldum«, m.a. á Levanger Brygge. Kórið hevur harumframt framført operettur og musikalar, har tey millum annað hava arbeitt saman við brøðrunum Kåre og Harald Bjørkøy.

Gøtufólk og onnur sangglað kunnu aftur gleða til eina forkunnuga konsert í Gøtu Kirkju.







| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Hósdagin | 20.05. | kl. $19^{00}$ | Hósdagin | 20.05. | kl. $22^{30}$ |
| Fríggjadagin | 21.05. | kl. $19^{30}$ | Fríggjadagin | 21.05. | kl. $23^{00}$ |
| Leygardagin | 22.05. | kl. $19^{30}$ | Leygardagin | 22.05. | kl. $23^{00}$ |
| Sunnudagin | 23.05. | kl. $19^{00}$ | Sunnudagin | 23.05. | kl. $22^{30}$ |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Hósdagin | 20.05. | kl. $20^{45}$ | Fríggjadagin | 21.05. | kl. $21^{15}$ |
| Leygardagin | 22.05. | kl. $21^{15}$ | Sunnudagin | 23.05. | kl. $20^{45}$ |

P BIO KIOSKIN P
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

HAVNAR BIO
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Hósdagin | 20.05. | kl. $23^{00}$ | Fríggjadagin | 21.05. | kl. $23^{30}$ |
| Leygardagin | 22.05. | kl. $23^{30}$ | Sunnudagin | 16.05. | kl. $23^{00}$ |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Hósdagin | 20.05. | kl. $16^{15}$ | Fríggjadagin | 21.05. | kl. $18^{30}$ |
| Leygardagin | 22.05. | kl. $18^{30}$ | Sunnudagin | 16.05. | kl. $18^{00}$ |




Hósdagin 20.05. kl. $18^{30}$ – *Seinasta sýning*

KOMANDI FILMUR




**Heimsfrumsýning – Forsølan er byrjað**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 28.05. | kl. $20^{15}$ | Fríggjadagin | 28.05. | kl. $23^{00}$ |